# MESSI GANDAÐI

**CHAMPIONS LEAGUE** Lionel Messi skoraði øll fýra málini, tá Barcelona sparkaði Arsenal úr Champions League í gjárkvøldið. Eftir dystin viðurkendi venjarin hjá Arsenal, at Barcelona var betri og at Messi er heimsins nógv besti fótbóltsspælari




**GANDAKALLURIN**

*Við sínum fýra málum prógvaði Messi, at hann er heimsins besti*
*Mynd: Polfoto*

Tróndur Arge

– Vit taptu í kvøld ímóti einum liði, sum var betri enn vit og sum eisini hevur heimsins besta fótbóltsspælara. Tillukku til Barcelona – teir vóru betri enn vit, segði venjarin hjá Arsenal, Arsene Wenger eftir dystin.

Nicklas Bendtner legði Arsenal á odda tíðliga í fyrra hálvleiki, men so tóku Barcelona og Lionel Messi yvir. Fyrst smekkaði Messi til uttan fyri brotssteigin og javnaði. Løtu seinni varð hann spældur leysur í brotssteiginum og legði Barcelona á odda. 21 minnuttir eftir 21. minutt, tá Messi skoraði sítt fyrsta, skoraði hann sítt triðja mál og harvið hattrick. Hann bleiv spældur leysur og lyfti bóltin upp um Arsenal-málverjan til 3-1.

Í seinna hálvleiki royndi Arsenal at koma seg, men Barcelona vardi væl fyri og hótti javnan í hinum endanum. Stutt fyri tíð skoraði Messi fjórða mál, tá hann í aðru atløgu fekk sent bóltin millum beinini á Almunia og skorað til endaúrslitið 4-1.

### Allir róstu Messi

– Fyri meg, so er Messi tann besti spælarin í øllum heiminum – nógv tann besti. Tá hann er við í spælinum, er hann ógvuliga vandamikil. Tá hann setir ferð á við bóltinum, er hann sera vandamikil, sigur Wenger um fýrafalda málskjúttan hjá FC Barcelona.

Síðsti skansin á Arsenal liðnum var málmaðurin, Manuel Almunia, sum fýra ferðir mátti fara í málið eftir bóltinum, eftir at Messi hevði roynt seg.

– Eg royndi at lesa hann av, men tað er sera torført. Hann gera hvat hann vil við bóltinum – tá hann vil. Tað er ringt at steðga einum slíkum spælara, segði Almunia eftir dystin.

Nicklas Bendtner, ið legði Arsenal á odda, viðgekk eisini at Barcelona og serliga Messi, bara hevði munin í gjárkvøldið.

– Barcelona var tað betra liðið og til tíðir tapir tú upp á handa mátan. Teir spældu góðan fótbólt, so um tú skalt tapa, so vilt tú helst blíva spældur av vøllinum. Lionel Messi er ein heilt ótrúligur spælari og tað prógvaði hann aftur í dag, segði danski landsliðsspælarin.

### Kunnu skriva søgu

Barcelona skal møta Inter Milan í hálvfinaluni í Champions League, og sjálvur høvuðspersónurin í gjárkvøldið, Lionel Messi, kundi hugsað sær at møtt onkrum øðrum.

– Vit kundu gott hugsað okkum at sloppið undan Inter, sum er vælkoyrandi, men nú verður tað soleiðis, og so taka vit tað, sum tað kemur, segði eyðmjúki argentinarin, ið heldur tosaði um liðið enn seg sjálvan.

– Nú hava vit møguleika at fara allan vegin, og tað vildi verið stuttligt, um vit kundu skrivað søgu sum einasta lið, ið vann Champions League tvær ferðir á rað. Tað kunnu vit gera.

*trondur@sosialurin.fo*

# Aftur Mourinho...

**CHAMPIONS LEAGUE** Inter gjørdi skjótt av í Moskva í gjárkvøldið, tí longu eftir seks minuttum hevði Wesley Sneijder skorað avgerandi málið

Tróndur Arge

Hetta er ikki fyrstu ferð, at José Mourinho rennur seg í Barcelona í Champions League. Við Chelsea rendi Mourinho seg fleiri ferðir í spanska stórfelagið, og so seint sum í bólkaspælinum í ár stóð Barcelona aftur á skránni.

– Persónliga er hetta er mín fjórða Champions League-hálvfinala. Eg havi vunnið eina, tapt eina upp á brotssparkskapping og tapt eina, orsakað av einum máli, ið ikki var, sigur Jose Mourinho, ið sipaði til, tá Liverpool í 2005 vann 1-0 á Anfield ímóti táverandi liði hansara, Chelsea.

– Vit hava vunnið fimm dystir á rað og hava uppiborið at rokkið hálvfinalunum. Tú kanst siga, at Inter er eitt broytt lið í Champions League-høpi. Vit hava ein dreym um at koma í finaluna, men Barcelona hevur fyrimun av at spæla seinnu hálvfinaluna á heimavølli.

Hetta er fyrstu ferð síðani 2003, at Inter spælir seg í hálvfinalunar í Champions League.

*trondur@sosialurin.fo*